

GREINARØÐ

# HEIMSINS STØRSTI SJÓNLEIKARI

**HANN FEKK SÍTT GJØGNUMBROT Á HVÍTA LØRIFTINUM. MEN TAÐ VAR VIÐ ØLLUM HEIMINUM SUM LEIKPALLI, AT RONALD REAGAN SLÓ SÍTT NAVN FAST SUM EIN TANN GLØGGASTI GLOBAL-POLITIKKARIN Í HEIMSSØGUNI**



## KALDA KRÍGGIÐ

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað vóru bæði viðhalds- og mótstøðufólk, sum ikki hildu tað heilt stóra um politisku evnini hjá Ronald Reagan, hóast hesin í november mánaði í 1980 vann forsetavalið móti Jimmy Carter.

Reagan, sum fram til 1962 stuðlaði demokratunum, hevði annars verið guvernørur í California, men bæði í 1968 og í 1976 gjørdist hann ov stuttur til at verða forsetavalevnið hjá republikanarunum.

Ein orsøk til, at hann varð undirmettur, var heilt víst fortíðin sum filmssjónleikari og seinni radiovertur. Tey vóru helst fleiri, sum hildu, at framførslur hansara av røðarastólunum vóru meira sjónleikur enn politikkur, og at Reagan í stóran mun var ein marionett hjá sterkum lobbyistum.

Veruleikin var tó ein annar. Tað kann væl vera, at spurnartekin kunnu setast við búskaparpolitikk hansara – Reaganomics – har færri handilsligar forðingar, skattalættar og tálman av almennu nýtsluni vóru hornasteinar. Í øllum førum vísti modellið seg ikki at halda í longdini.

Men veruleikin var helst – eru fleiri søgufrøðingar samdir um – Ronald Reagan samstundis var ein tann besti globali strategurin í søguni hjá USA. Og neyvan hevur nakar amerikumaður havt eins stóra ávirkan á tað, sum skuldi gerast endin á kalda krígnum.

### Tosaði seg til broyting

Fastlæsta støðan – détentin – sum fasthelt kalda krígnum í eini støðugari vápnadubbing var ein góðtakan av, at heimurin var í tveimum pørtum. At kommunisman og kapitalisman vóru støðugu mótsetningarnir, sum upp á sín egna máta tryggjaðu heimsfriðin. Í seinasta enda við sonevndu MAD-strategi'ini, sum garanteraði totalt ragnarok, um nýtt kríggj brast á. Ein støða, har tað var hóttanin um álop, ið tú ikki kundi verja teg fyri, sum gjørdi, at eingin parturin veruliga tordi at leypa á.

Endamálið við détentini var at halda fram við kalda krígnum, og tí var sannføringin hjá Ronald Reagan, at skuldi ein endi fáast á kalda krígnum, mátti détentin jarðleggjast fyrst av øllum. Ein sannføring, sum fullkomuliga breyt við alt tað, sum amerikanskir og sovjettiskir leiðarar høvdu hildið fast um seinastu trý tíggjuáraskeiðini.

Nógv kundi ivaleyst endað øðrvísi, um morðroyndin, sum ein sinnisjúkur maður framdi tann 30. mars í 1981, hevði eydnast. Endamálið hjá sinnisjúka manninum var at imponera Jodie Foster, og hevði hetta eydnast, hevði George H. W. Bush tikið sæti í Hvítu Húsunum, og heimurin hevði helst sæð øðrvísi út.

Bush fataði eins og flestu samtíðar politikkarar kalda kríggið sum permanent, men eins og Lech Walesa, Johannes Paul II pávi, Margaret Thatcher og Deng Xiaoping dugdi Reagan at síggja, at eisini permanentar støður kundu broytast.

Eins og hesi – og kanska enn betur – dugdi Reagan at gera nýtslu av tosaða orðinum. Við dramatiskum framførslum í almennu røðum sínum breyt hann gamla vanahugsan.

### Ræddi kommunistarnar

Fyrsta dømið kom bara hálvan annan mánað eftir morðroyndina, sum mundi endað forsetaskeið hansara. Umframt at tosa um ein betri heim, staðfesti hann djarvt, at Vesturheimurin ikki hevði fyri neyðini at innibyrgja kommunismuna. Ei heldur at fordøma hana. Vesturheimurin fór bara at forkasta kommunismuna sum eitt løgið fyribrigdi í heimssøguni.

Heldur enn at fokusera upp á tvídystin við Sovjetsamveldið, valdi Reagan at fokusera upp á, at talan bara var um nakað, sum var komandi og farandi.

Eitt ár seinni segði hann í røðu til bretska parlamentið, at Karl Marx hevði havt rætt. At valdið og bondini, sum kúgaðu arbeiðarafjøldina, fóru at bera uppreistur við sær. Men Reagan segði, at hetta hendi í Sovjetsamveldinum. Í eini skipan, sum noktaði sínum íbúgvum frælsi, men sum ikki megnaði at breyðføða somu íbúgvum. Og hann staðfesti, at eitt stýri, sum einans stendur fast við bajonettum, ikki festir røtur millum fólkið.

Timingin var perfekt. Allur Eysturblokkurin var í svárari búskaparligari og ideologiskari kreppu. Í Póllandi hevði undantaksstøðan steðgað Solidaritet, men ónøgdin millum borgararnar var stór. Afghanistan var vorðið eitt blóðreytt heingipartí, og kavandi oljuprísirnir tóku botnin undan búskapinum.

**Keldur:**
Den kolde krig, John Lewis Gaddis, 2005 Hitler and Stalin, Alan Bullock, 1992
Erindringer fra krig og genopbygning, Leonid Brezjnev, 1978 Perostrojka, Michael Gorbatjov, 1987
Stalin – Den røde zar og hans hof, Simon Sebag Montefiore, 2004 wikipedia